**Sjálvstøðugar PS-konti og forskotskassi**

Argir, tann 13-06-00
J.Nr.: 1210 (at tilskila í svari)
Viðgjørt: AL

**<u>Viðvíkjandi heimild at geva stovnum loyvi til sjálvstøðugar peningastovnskonti og forskotskassa</u>**

Við hesum gevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Føroya Gjaldstovu heimild frá 15. juni 2000 at taka avgerð um stovnar skulu hava sjálvstøðugar peningastovnskonti og forskotskassa sambært §3, stk. 6, í kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996 um roknskaparverk landsins o.a.

Mannagongdin framyvir verður sostatt hendan:

- Stovnar senda umsókn um sjálvstøðuga peningastovnskonto ella forskotskassa til avvarðandi aðalstýri til tilmælis.
- Aðalstýri viðger umsóknina, og tekur avgerð um mælast skal til, at stovnur skal hava sjálvstøðuga peningastovnskonto ella forskotskassa.
- Umsóknin verður, saman við tilmælinum, send Føroya Gjaldstovu at taka avgerð um.

Karsten Hansen
*landsstýrismaður*

/
Petur Alberg Lamhauge
*fíggjarmálastjóri*

Avrit av hesum skrivi er sent øllum aðalstýrunum.